

*– Smiðjuídnaðurin og tænastuvinnan í Suðuroynni hevur bara eitt bein at standa á, og tað hevði verið ynskiligt, at tær fingu ein aðra, stóra vinnu at styðja seg til, enn bara fiskivinnuna.*

oyum, krevst at finna eitt pláss, at upp- og avskipingarmøguleikarnir eru góðir, tvs. at tað krevjast góðir fjarðir og siglingarleiðir.

Hartil krevur ein oljuhavn stórt lendi framvið havnini.

Bogi Mortensen helt, at tað tí náttúrliga kann verða trupult at finna ein so góðan fjørð, sum krevst, sum eisini hevur so stórt lendi, sum krevst.

**Nógv arbeiðspláss**

Ein annar partur av oljuvinnuni er, sum nevnt, flogferðsla.

– Tyrlur flyta arbeiðsfólk og útgerð ímillum land og oljupallar. Og somuleiðis er stórur flutningur til og úr landinum.

Bogi Mortensen sigur, at í fyrstu atløgu gevur hetta nógv arbeiðspláss í sambandi við sjálvan flutningin.

– Men harafturat eru uppaftur fleiri størv í vinnum rundanum sjálvan flutningin. Á flogvøllinum er nógv fólk í arbeiði, flogfør og tyrlur skulu javnan til kanningar, og tey skulu hava brennievni og aðrar tænastur.

Tey, sum ferðast um flogvøllin, skulu avgreiðast báði tá ið tey koma, og táið tey fara. Somuleiðis skulu tey á trygdarskeið, hvørja ferð, tey fara út á pallar. Brandstøð skal verða við flogvøllin og radarskipanir at halda skil á loftferðsluni, skulu verða. Somuleiðis eru báði matstovur og handlar á flogvøllinum.

Bogi Mortensen nevndi í hesum sambandi flogvøllin í Sumburgh Head í Hetlandi sum dømi. Har arbeiða eini 450 fólk beinleiðis, ella óbeinleiðis við flogferðsluni.

Hann segði, at hóast Suðuroyggin liggur næst teimum støðum, har borað verður til havs, er ikki sannlíkt, at flogvøllur verður lagdur í oynni, tí tað er longu ein flogvøllur í Føroyum.

Hinvegin kundi hugsast, at tyrlupallur verður gjørdur í Suðuroy og hann hevði eisini skapt nógv arbeiði, báði beinleiðis og óbeinleiðis.

**Møguleiki fyri útgerðarhavn**

Men so er tað tann parturin í oljuvinnuni, sum hevur við útgerðarhavn at gera.

Tað eru „supply" og „Stand by" skipini, sum sum sigla um havnirnar til og frá pallunum.

– Virksemið í eini útgerðarhavn er stórt við tað ,at útgerð, tilfar o.a., sum skal flytast út á pallarnar, skal fyrst skipast upp, og á goymslu í útgerðarhavnini.

– Eftir tørvi verða „supply" skipini lastað, og tey føra so farmin út á pallarnar.

– Tað er eyðsæð, at á slíkari havn eru nógv arbeiðspláss, báði umborð á skipum og á landi.

– Og við tað, at Suðuroyggin báði er næst borpallunum, og evropiska meginlandið, skuldi ein møguleiki verið fyri at ein slík havn verður í Suðuroynni.

– Men eitt er greitt. Og tað er, at tað verður bara tann eina útgerðarhavnin í oynni kanska í øllum Føroyum.

– Tí er tað umráðandi, at vit standa saman um eitt slíkt tiltak. Tí sama, hvar í oynni, ein slík havn verður, fær øll oyggin ágóðan av henni.

Bogi Mortensen sigur, at brúka vit aftur Hetland sum dømi, og kannar eftir, hvønn týdning útgerðarhavnin í Lerwick hevur, so sigla 5.000 skip út og inn úr Havnini um árið. Umsetningurin er 60 milliónir krónur, og yvirskotið eftir skatt hevur verið seks milliónir.

– Hetta er ikki bara av oljuvinnuni, tí her er eisini talan um fiskiskip og ferðamannaskip, men tað er heilt greitt, at tað er oljuvinna, sum kastar mest av sær.

Bogi Mortensen sigur, at umframt virksemið í sjálvari oljuvinnuni, hevur tað líka stóran týdning at tosa um, hvørja ávirkan oljuvinnan fer at fáa á smáídnaðin, tænastuvinnuna og ferðavinnuna í oynni.

– Kemur oljuvinna, fáa hesar vinnur eina aðra vinnu, enn fiskivinnuna, at veita vørur og tænastur.

**Neyðugt við kjaki**

Bogi Mortensen segði, at hansara vón var, at hesar hugleiðingar hansara kundi verða við til at birta uppundir eitt neyðugt kjak um framtíðar vinnulívið í Suðuroy, báði ímillum fólk í teimum einstøku vinnunum og ímillum fólk í ymsum vinnum.

- Kanska kundi eitt framhald av hesum verið, at hvør vinnugrein varð viðgjørd av fólki, sum arbeiddu júst í hesi vinnu, og tí hevði gott innlit í hana, segði hann at enda.

# Bridge

Í samband við at 18-20 bridgespælarar úr Íslandi koma til Føroya fríggjadagin 29. august, verður skipað fyri almennari parakapping í Bridgehúsinum í Gundadali.

Kappingin verður skipað sum ein vanlig parakapping og verður byrjað fríggjakvøldið kl. 19 stundisliga. Tey, ið skulu spæla við, skulu møta 5 minuttir áðrenn leikbyrjan.

Íslendingarnir sum koma henda vegin eru allir spælarar, ið spæla nógv bridge, summir av teimum spæla fleiri kvøld um vikuna.

Tá útlendingar koma henda vegin at spæla bridge, er hetta ein góður møguleiki hjá føroyskum bridgespælar um at royna seg.

Fyrireikararnir vóna at nógvir spælarar møta upp til parakappingina.

Vit hava
OPIÐ
hóskvøld:
frá kl. 17.00–24.00
fríggjakvøld:
frá kl. 17.00–03.30
leygarkvøld:
frá kl. 17.00–03.30
sunnukvøld:
frá kl. 17.00–24.00
Casablanca
Night Club
Torsgøtu 11 • 100 Tórshavn
Tlf. 19696

Rimmar
FERÐATILBOÐ
Úr Føroyum við Maersk Air til:

- LONDON
- AMSTERDAM
- BRÜSSEL
- PARÍS
- FRANKFURT
- STOCKHOLM
- GENEVE (+ kr. 650,-)
Galdandi 20/8–14/12
Einans kr. 2.650,-
– báðar vegir
Ferðaavgjøld ikki íroknað
Børn 2–17 ár fáa 50% í avsláttri
Minsti steðgur sunnunátt – mesti 1 mánaða
Ring og hoyr meira!
SMYRIL LINE
J. Broncksgøta 37
Tlf. 15900